# Almannamálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 25. september 2017
Mál nr.: 17/00788
Málsviðgjørt: MFH/PL

**Løgtingsmál nr. 21/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.** (Viðbót eisini treytað av nettoinntøku, ið verður skattað eftir kapitalvinningsskattalógini)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.

(Viðbót eisini treytað av nettoinntøku, ið verður skattað eftir kapitalvinningsskattalógini)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997 um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl., sum broytt við løgtingslóg nr. 28 frá 13. mars 2000, løgtingslóg nr. 58 frá 10. mai 2000, løgtingslóg nr. 10 frá 9. februar 2001, løgtingslóg nr. 104 frá 11. november 2010, løgtingslóg nr. 65 frá 15. mai 2012, løgtingslóg nr. 135 frá 19. desember 2014, løgtingslóg nr. 48 frá 6. mai 2016 og við løgtingslóg nr. 115 frá 24. november 2016, verður í § 3 sum stk. 2 sett:

"*Stk. 2.* Umframt ásetingina í stk. 1 er viðbótin treytað av, at virði av nettoinntøku, ið verður skattað eftir reglunum í kapitalvinningsskattalógini, og sum er partur av inntøkugrundarlagnum sambært § 6 a, ikki er omanfyri kr. 2.000."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjald frá og við januar 2018.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Viðbót til ávísar pensjónistar er ein stuðul, ið er ætlaður sum eitt alment ískoyti til teir pensjónistar, ið eru ringast fyri fíggjarliga.

Grundarlagið undir inntøkuuppgerðini, ið verður nýtt, tá mett verður um, hvørt viðkomandi hevur rætt til viðbótina, er tað sama, sum nýtt verður í almannapensjónslógini. Inntøkugrundarlagið er seinast uppgjørda skattskylduga inntøkan undantikið pensjónir og arbeiðsmarknaðareftirløn. Til inntøkuna verða eisini íroknaðar nettoinntøkur, ið verða skattaðar sambært løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi.

Talið av fólkapensjónistum, ið hava spart upp til kapitalpensjón v.m. seinastu mongu árini er merkt av, at virðið av uppsparingum o.ø. kann geva ávísar rentuinntøkur. Hetta merkir eisini, at virðið av rentuinntøku vísir, at fólkapensjónistar, sjálvt um teir ikki hava skattainntøkur frá arbeiði ella pensjón, hava høgar uppsparingar o.l., ið geva eitt avkast, ið verður skattað.

Teir fólkapensjónistar, ið hava rentuinntøku frá stórari uppsparing, hava ikki somu fíggjarligu kor sum teir fólkapensjónistar, ið ikki hava uppsparing ella aðra skattskylduga inntøku. Lógarbroytingin hevur tí til endamáls at avmarka viðbótina til tey, ið eru fíggjarliga ringast fyri og sum einans hava smávegis av inntøku ella uppsparing við síðuna av pensjónini.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Sambært verandi lóggávu kunnu borgarar, ið fáa pensjónsveiting, eisini fáa viðbót til ávísar pensjónistar, um árliga inntøkan umframt pensjónina ikki er omanfyri kr. 60.000 hjá støkum og kr. 80.000 hjá giftum, íroknað inntøku hjá hjúnafelaga. Hetta er galdandi fyri fólkapensjónistar og fyritíðarpensjonistar, tó undantikið teir fyritíðarpensjónistar, ið búgva á stovni.

Viðbótin hevur síni uppruna í 1980, tá táverandi stuðul varð ætlaður sum ískoyti til oljugjald. Hetta er orsøkin til, at viðbótin í dag eisini verður rópt “brennistudningur”. Frá 1988 til og við 1994 varð stuðul eisini veittur sum ískoyti til samskiftisútreiðslur. Frá 1994 og til verandi lóg fekk gildi, fevndi stuðulin um olju-, sjónvarps- og kringvarpsgjald.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at avmarka rættin til viðbót til ávísar pensjónistar til teir pensjónistar, ið eru fíggjarliga ringast fyri.

Við broytingini fara pensjónistar, ið hava høga rentuinntøku av uppsparingum v.m., ikki at fáa viðbótina.

Sambært uppgerðum yvir inntøkur hjá fólkapensjónistum verður mett, at umleið 10% av pensjónistunum, ið í dag fáa viðbót til ávísar pensjónistar, hava rentuinntøkur omanfyri 2.000 kr. árliga. Talan er serliga um fólkapensjónistar, og er talan um umleið 500 persónar.

So hvørt sum talið av fólkapensjónistum veksur, veksur eisini talið av teimum, ið hava spart upp til pensjónsárini, herundir til kapitalpensjón. Hesir fólkapensjónistar, ið hava stórt uppspart kapitalvirði, skulu tí ikki eisini fáa fíggjarligan stuðul, tá ið viðbót til ávísar pensjónistar altíð hevur havt til endamál at stuðla teimum, ið er fíggjarliga ringast fyri.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Uppskotið kemur at hava við sær, at viðbótin í størri mun enn áður verður eyðmerkt til teir pensjónistar, ið eru fíggjarliga ringast fyri.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið hevur ikki verið til ummælis, men verður sent til ummælis samstundis sum uppskotið er lagt fram.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið verður mett at geva ein sparing upp á 3-4 mió. kr. Metingin tekur støði í upplýsingum um inntøku hjá pensjónistum, ið hevur verið nýtt til uppgerð av pensjónsinntøku við árslok í 2013. Síðani tá er rentuvirðið minkað nógv, og merkir hetta millum annað, at uppsparda virðið má metast at vera høgt, um rentuinntøkan er 2.000 kr. ella hægri. Uppskotið hevur ikki ávirkan á kommunurnar, tí veitingin er skattafrí.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur við sær umsitingarligar útreiðslur fyri Almannaverkið, tí at mótrokningarskipanin, ið nýtt verður í sambandi við pensjónsútgjaldið, má tillagast. Mett verður tó, at talan er um minni broyting, og at inntøkuupplýsingarnar longu eru tøkar sambært verandi uppgerð av inntøku.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið merkir, at pensjónistar, ið hava nettoinntøkur, ið verða skattaðar eftir kapitalvinningsskattalógini, við einum samlaðum virðið á omanfyri kr. 2.000 ikki hava rætt til viðbót til ávísar pensjónistar.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Marknaforðingar**
Ongar kendar marknaforðingar eru, ið uppskotið kemur at hava ávirkan á, og uppskotið hevur ikki við sær marknaforðingar annars.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting ella sektir.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið áleggur ikki skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**
Sambært ásetingini verður gjørt upp, um pensjónistar hava nettoinntøku omanfyri kr. 2.000, ið verður skattað eftir løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi, og um so er, so hava hesir pensjónistar ikki rætt til viðbót til ávísar pensjónistar.

Tað merkir, at um pensjónistur hevur skattskylduga inntøku afturat pensjónini, ið er minni enn kr. 60.000 fyri støk og kr. 80.000 fyri gift, og harumframt at virðið av t.d. rentuinntøku ella líknandi er omanfyri kr. 2.000, lýkur viðkomandi ikki treytina fyri at fáa viðbót til ávísar pensjónistar.

T.d. vildi ein uppsparing omanfyri kr. 200.000 við einum rentustøði á 1% givið rentuinntøku yvir 2.000 kr., og harvið hevur viðkomandi ikki rætt til viðbót til ávísar pensjónistar. Á sama hátt vildi ein uppsparing omanfyri kr. 570.000 við einum rentustøði á 0,35% givið rentuinntøku yvir 2.000 kr. og harvið heldur ikki rætt til viðbót til ávísar pensjónistar.

**Til § 2**
Gildiskomuáseting.

Almannamálaráðið, 25. september 2017

**Eyðgunn Samuelsen**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Fylgiskjøl:**
Javntekstur